## 1000 fólk hava umboðað Føroyar

Føroyar hava verið við á Oyggjaleikum síðani byrjanina í 1985, tá ið fyrstu leikirnir vórðu hildnir á Isle of Man. Hesar 12 leikirnar síðani hava umleið 1000 ítróttarfólk umboðað Føroyar á Oyggjaleikum. Føroyar hava luttikið í nógvum ymiskum ítróttargreinum hesi árini. Hesaferð eru umleið 120 føroysk ítróttarfólk við í kappingunum á Álandi.



## Wight og Bermuda fyri framman

Tað er longu nú greitt, hvar Oyggjaleikirnir verða næstu tvær ferðirnar. Í 2011 verða leikinir hildir á Isle of Wight, sum liggur sunnanfyri bretska meginlandi. Isle of Wight var eisini vertur fyri Oyggjaleikunum í 1993. Í 2013 longur leiðin – tann langa leiðin – til Bermuda, sum hevur tikið lut í Oyggjaleikunum síðani 2003. So føroyingar skulu fyrireika seg til sólríkar Oyggjaleikir næstu árini.

# Rennandi judarin

**Hann er elstur av føroysku ítróttarfólkunum á Álandi. Á leikunum í 1989 luttók hann eisini. Tá og síðani hevur hann vunnið fleiri heiðursmerki í oyggjaleikahøpi. Seinast hann luttók var á oyggjaleikunum í 2005, tá hann millum annað rann hálvt-maraton. Nú ger hann comeback á judolandsliðnum, og ætlar sær at vinna heiðursmerki aftur. Maðurin er 38 ára gamli Sam Vang**




rolant@sosialurin.fo

Rólant Waag Dam




– Hvat konditiónini viðvíkur eri eg væl fyri. Dystarvenjingin kundi verið betri, tí tað eksplosiva, sum er neyðugt í judo, vantar enn eitt sindur, men tað er við at vera har, sigur Sam Vang

Hann hevur ikki vant judo í átta ár. Kortini vóru boð send eftir honum, tá judolandsliðið skuldi mannast. Sam Vang er fleirtaldur heiðursmerkjavinnari í oyggjaleikahøpi, men hevur seinastu mongu árini vunnið síni heiðursmerki í føroyskum rennikappingum.

Nú ger hann so comeback á judolandsliðnum, og eftir at hava vant miðvíst seinastu tveir mánaðirnar, er Sam Vang við at finna formin aftur, sum hjálpti honum at vinna gull á oyggjaleikunum á Gibraltar í 1995.

– Hvat konditiónini viðvíkur eri eg væl fyri. Dystarvenjingin kundi verið betri, tí tað eksplosiva, sum er neyðugt í judo, vantar enn eitt sindur, men tað er við at vera har, greiðir Sam Vang frá.

### FAKTA

**Føroyska judolandsliðið er mannað við hesum monnum**
Nicolaj Skoubo
Sam Vang
Búgvi Hanusarsson Hansen
Sigurd Bjørn Mørkøre
Hjalmar Johannesen
Jógvan Páll Kristiansen
Búgvi Poulsen
Áki Davidsen
Bjørn Andreasen
Nicolai Mohr Vang
Petur Sigurð Johannesen
Ragnar við Streym
Skarpheðin Njálsson
Olaf Andreasen
**Venjari:** Zvonko Mrdalo

### Elstur av øllum

Hann er elsta føroyska ítróttarfólki á Álandi, men Sam metir seg vera eins góður og restin av føroysku judoíðkarunum, sum fara avstað. Tískil er málsetningur hansara høgur, tá farið verður á motturnar í Álandi.

– Tað er einum medaljuplássi, eg fari eftir. Eg meti meg vera eins góðan nú sum í 1995. Teknikkin havi eg og dystarvenjingin er mest sum ájavnt ta, hon var tá, so spurningurin er bara, hvussu sterkir hinir eru, sigur Sam Vang, sum eisini vann gull á Álandi í 1991. Í Føroyum í 1989 og á Isle of Wight í 1993 gjørdist talan um silvur.

### Vigar tað sama sum í 1989

Merkisvert er, at Sam Vang øll árini bardist í sama vektflokki, og nú hann er 38 ára gamal, vigar hann enn tað sama, sum hann gjørdi, tá hann var 18 ár í 1989.

– Her hevur renningin hjálpt mær væl, og eg renni jú eisini hvønn dag til og frá arbeiði, fortelur Sam Vang, sum býr í Havn og dagliga arbeiðir á Sundsverkinum. Sostatt rennur hann góðar 13 kilometrar um dagin.

Renningin hevur eisini havt fremstu raðfesting hjá Sam seinastu árini. Hann ætlaði eisini at luttaka í hálvtmaratonkappingini á Álandi, men tað eydnaðist honum ikki.

### Vónandi betri enn Rhodos

Nú verður tað so einans judo, ið Sam skal savna seg um á leikunum, og vónirnar eru góðar.

– Tað er trupult at meta um, hvat vit kunnu vænta, men eg trúgvi tað verður umleið sama úrslit sum á Rhodos. Har kundu vit, við eitt sindur av hepni, fingið onkra gull aftrat, heldur enn silvur, sum vit fingu nógv av, so vónandi verður úrslitið nakað betri enn tá, heldur Sam Vang fyri.

Á Rhodos vann føroyska judolandsliðið ikki færri enn eitt gull-, seks silvur- og tvey bronsumerki, og gjørdist nummar tvey í liðkappingini.

Hjá Sam sjálvum eydnaðist tað eisini at vinna eitt gull heiðursmerki, áðrenn hann fór til Álands. Hóast nógv judovenjing hevur verið á skránni, so vórðu renniskógvarnir tiknir upp á Sundalagsstevnu síðsta vikuskiftið, har Sam kom fyrstur um málstrikuna á sjey kilometra langa teininum.

### JUDO

Tað er eitt vælmannað judolið, sum fer til Álands. Fyri fyrstu ferð nakrantíð, eru tveir luttakarar meldaðir til í hvørjum bólki, og sostatt er judolandsliðið fullmannað. Av teimum 14, sum mannað liðið, luttaka seks av teimum somu sum á Rhodos í 2007. Harumframt er Sam Vang, ið hevur drúgvar oyggjaleikaroyndir í judo, við aftur. Tað merkir, at helvtin av judolandsliðnum hevur luttikið á oyggjaleikunum áður.

Í judo eru luttakararnir býttir upp í vektbólkar, og kappast verður sum einstaklingar, umframt at ein liðkapping eisini er, har sjey luttakarar manna liðið – ein úr hvørjum vektbólki.